# Tora ikki at dúva uppá høgan oljuprís

**Sjálvt um oljuprísurin er hækkaður nógv síðani ársbyrjan, og í dag liggur á umleið 68 dollarar fyri tunnuna, eru fleiri av teimum størru oljufeløgunum varin við at taka alt ov stórar váðar á seg.**

OLJUPRÍSUR

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



Í samband við eina oljuráðstevnu í Oslo í hesum døgum, sigur forstjórin í Statoil-Hydro, Helge Lund, við Dagens Næringsliv, at fíggjarkreppan hevur havt stóra ávirkan. Hann sigur, at tað vit øll hava verið ígjøgnum ger, at tey, sum sita og taka avgerðirnar taka minni váða á seg í dag. Tann hækkaði oljuprísurin broytir ikki hetta, sum nú er. Hann sigur m.a., at vit skulu vænta sveiggj í oljuprísinum uppá stutt sikt: - Marknaðurin vil framvegis sveiggja, og vit skulu fyrireika okkum til lægri oljuprísir uppá stutt sikt, enn tað vit síggja í dag. Uppá longri sikt vænta vit hækkandi oljuprísir. Vit stýra ikki eftir oljuprísinum, og eisini mugu vit gera tillagingar í mun til gjaldførið. Hann sigur eisini, at tey hugsa seg betur um, áðrenn tey gera stórar íløgur: -Í 2008 og 2009 hava vit gjørt methøgar íløgur uppá 100 milliardir árliga. Vit koma at halda áfram við eini offensivari strategi, men koma eisini at fokusera enn meira uppá útreiðslurnar.

Á ráðstevnuni segði hann eisini, at príshækkingin tað seinastu tíðini er drivin av forvantningum um betraðan eftirspurning og ikki knýttur at teimum núverandi fundamentalu viðurskiftunum í búskapinum.

# Met í umsóknum annað árið á rað

Granskingarráðið hevur fingið 46 umsóknir um stuðul, nú freistin er úti. Hetta er met annað árið á rað. Í 2008 komu 39 umsóknir inn.

Søkt verður um umleið 35 milliónir krónur innan øll seks høvuðsøkini, sum Granskingarráðið flokkar umsóknirnar eftir.

Tað eru umleið sjey milliónir krónur tøkar í Granskingargrunninum til stuðuls í 2009.

- Nú verður farið undir at kanna umsóknirnar fyri at vita, um tær lúka formligu treytirnar. Síðani skulu ráðgevar finnast, sum fara at meta um vísindaligu góðskuna v. m. í umsóknunum. Um mánaðarskiftið novem-ber-desember fer Granskingarnevndin at taka endaliga støðu til, hvørjar verkætlanir skulu stuðlast, sigur Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum.

Í 2008 søktu 39 umsøkjarar um uml 31 milliónir krónur, av hesum fingu 12 umsóknir stuðul, tilsamans 7.367.000 kr.

Fleiri tíðindir á heimasíðuni hjá Granskingarráðnum: http://www.gransking.fo




